## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi men hann veksur vindin seinnapartin upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og leygardagin yvirhøvur turt, men sunnudagin stundum regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Tørvur á teldustøðingum

**Føroya Handilsskúli kundi í februar mánaða stoltur siga, at fyri næsti flokkurin í teldustøðingum er útbúgvin**

ÚTBÚGVING
*Ingrid Bjarnastein*

Føroya Handilsskúli í Havn fóri í 1998 undir at útbúgva teldustøðingar. Orsøkin til tess var, at ein átrokandi tørvur er á hesum, og er hesin tørvur staðfestur bæði í føroyska vinnulívinum og á almenna økinum. Hesin tørvur bara veksur so hvørt, sum nýggjar vinnur taka seg upp, og kunningartøknin mennist. TÍ metti Handilsskúlin, at neyðgt var at fara undir at útbúgva teldustøðingar.

Útbúgvingin tekur tvey ár, og verður sagt av Handilsskúlanum, at undirtøkan hevur verið góð hvørja ferð lýst hevur verið eftir næmingum. Fyrsti flokkurin av teldustøðingum varð klaktur í 2000 og nú er annar flokkurin liðugur. Einasta krav fyri at sleppa at lesa til teldustøðing er, at tú hevur eina miðnámsútbúgving.

Teldustøðingaútbúgvingin er ein liður í, at kunna veita fleiri møguleikar viðvíkjandi útbúgving til føroyskar ungdómar, og eisini tilkomin, og til teirra, ið ynskja eina stutta útbúgving.

Ætlanin innihelt eisini, at teldustøðingarnir kundu halda áfram at lesa BS í teldufrøði á Fróðskaparsetrinum, og hesin møguleiki stendur nú opin fyri teimum.

Í næsta flokkinum við teldustøðingum frá Føroya Handilsskúla vóru 21 næmingar.



*Aftast f.v. Rani H. Christiansen, Bárður Viðberg Dam, Jon Jonsen, lærari, Sølvi Sjúrðarson Joensen, Viggo Johannesen, Brian Sjúrðarson Joensen, Øssur Joensen, Jóannes Johannesen, Ingi Jacobsen og Jacob Martin Jacobsen. Í miðjuni f.v Trygvi Reynatrøð, Pauli Mortensen, Karsten Jensen, Axel McIntosh og Jóan Pauli Hansen. Fremst f.v Gudny D. Højgaard, Maud Sigurðsdóttir Simonsen, Irdi Jacobsen, Magni Jøkladal Hansen. Katrin B. S. á Mýrini og Píl K. Reinert*











### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷7 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 4 |
| Reykjavik | 5 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 14 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | 21 |
| New York | 25 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 976 hPa. sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og grynnist. Brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum hóskvøldið.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland grynnist og hátrýstið yvir Norður-Noreg fer móti Norðsjónum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/04 kl. 06⁰⁰– 16/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 15/04 kl. 06⁰⁰– 16/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 35,1 mm






### VESTFALLSKYRRINDI

10. apríl: Mánin longst frá jørðini
12. apríl: Tendring
20. apríl: Fyrra kvarter
25. apríl: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. apr | 10.44 | 23.07 | 09.44 | 22.07 | 09.59 | 22.22 | 00.21 | 12.44 | 01.21 | 13.44 | 08.59 | 21.22 | 07.59 | 20.22 | 10.59 | 23.22 | 11.59 | — | 10.29 | 22.52 | 11.44 | — |
| 18. apr | 11.33 | 23.56 | 10.33 | 22.56 | 10.48 | 23.11 | 01.07 | 13.33 | 02.07 | 14.33 | 09.48 | 22.11 | 08.48 | 21.11 | 11.48 | — | 00.22 | 12.48 | 11.18 | 23.41 | 00.07 | 12.33 |
| 19. apr | — | 12.21 | 11.21 | 23.47 | 11.36 | — | 01.56 | 14.21 | 02.56 | 15.21 | 10.36 | 23.02 | 09.36 | 22.02 | 00.11 | 12.36 | 01.11 | 13.36 | — | 12.06 | 00.56 | 13.21 |
| 20. apr | 00.47 | 13.27 | — | 12.27 | 00.02 | 12.42 | 02.47 | 15.27 | 03.47 | 16.27 | 11.42 | — | 10.42 | 23.22 | 01.02 | 13.42 | 02.02 | 14.42 | 00.32 | 13.12 | 01.47 | 14.27 |

5 707265 100036 >